# Býráðsfundur 27.03.2023

**Býráðsfundur 27.03.2023 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | Avboð |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | Avboð |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 30/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 31/2023 – Vegurin um Kornvatn | ALMENT |
| Mál nr. 32/2023 – Íløgur á Svangaskarði | ALMENT |
| Mál nr. 33/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 34/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 35/2023 – Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 264i | ALMENT |

**Mál nr. 31/2023 – Vegurin um Kornvatn ALMENT**

J.nr.: 1302-3-2023

Vegurin um Kornvatn er í sera vánaligum standi og treingir til bráðfeingis ábøtur. Vegurin er nærum skrædnaður. Um bilar fara útav, kann tað hava álvarsligar avleiðingar fyri drekkivatnið hjá Nes kommunu. Nes kommuna hevur heitt á Landsverk, sum varðar av vegnum, um at breiðka og styrkja vegin. Landsverk vísir á manglandi fígging og skjýtur upp at steingja vegin, og í minsta lagi at steingja vegin fyri tungari ferðslu.

Um vegurin verður stongdur, verður tað til stóran ampa fyri ferðavinnna í økinum og annars øll, sum vanliga brúka vegin.

Tekniska deild hevur mett, saman við arbeiðstakara, hvat kostnaðurin fyri at breiðka og tryggja vegin er.

Borgarstjórin skjýtur upp, at kommunan aftur sendir eitt skriv til LV við einum møguligum fíggingarleisti millum Nes kommunu, LV og ferðavinnuna. Harafturat verður staðiliga heitt á LV um at gera bilverju á sjálvum vegastrekkinum við Kornavatn.

**Á fundi tann 15.03.2023 mælir Tekniska nevnd til at taka undir við uppskotinum hjá borgarstjóranum.**

**Elin á Torkilsheyggi var úti undir viðgerðini.**

**Á fundi tann 21.03.2023 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd. Peningurin verður tikin av stovninum "Vegir".**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 32/2023 – Íløgur á Svangaskarði ALMENT**

J.nr.: 2006-3-2023

Higartil í ár eru hesar íløgur umbidnar á Svangaskarði:

Gummi til vøll v/leigu av amboðum
10 nýggj vindeygu
Vindeygu – ísetan
Tilfar til vindeygu
Køkur

Aðrar íløgur, sum liggja fyri framman í ár, eru málgoymsla, vallarljós og máltalva.

Væntandi fyriliggur kostnaðrmeting um ljósini til komandi nevndarfund.
Umsjónarmaðurin á Svangaskarði hevur um hendi at fremja arbeiðið av málgoymsluni.

Tilboð er komið uppá máltalvur frá tveimum veitarum. Støddin er sera ymisk, og prísirnar eru hareftir. Tilboðini eru komin inn aftaná fundin í Teknisku Nevnd, og tí hevur bara Fíggjarnevndin viðgjørt málið.

Út frá einum heildarsjónarmiði verður mælt til:

Møguleiki 2: kr. 165.500 u/mvg
5,53m$^2$, 1,9m høgur og 2,9m breiður. IP 67/66.

Afturat kemur ein árligur kostnaður kr. 11.000 + 4.000.
Umsjónarmaðurin at Svangaskarði syrgir fyri, at fipurkaðal verður lagdur til verandi fundament.

**Á fundi tann 21.03.2023 mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðnum á kr. 165.500 u/mvg, og at peningurin verður tikin av stovninum "Íløga Svangaskarð".**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 35/2023 – Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 264i ALMENT**
J.nr.: 1203-2-2023

Í samband við íbúðarbyggingina við Regnavegin er greitt, at verandi byggisamtyktin ikki er heilt nøktandi. Tí er neyðugt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

Tá kommunan bjóðaði økið út, bant kommunan seg í útbjóðingartilfarinum til at tillaga byggisamtyktina í økinum til útvalda uppskotið.
Ætlanin er, at serstaka byggisamtyktin sum heild skal hava somu ásetingar sum A2 øki, men at mest loyvda hædd skal broytast frá 12m uppá 17m.

**Býráðið samtykti einmælt at taka undir við serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 264i.**

**Dakko Petersen var úti undir viðgerðini.**